Hans Jákup Mikkelsen, Vinnuhúsið:

# - Nú ræður um at vera kappin

**- Hóast vit eru komin seint upp á ”vognin” í hesum sambandi, gevur kumuleringsavtalan góðar møguleikar – frá nú av og frameftir. Avtalan leggur upp til fríari kapping og størri gjøgnumskygni í vinnuni, sigur Hans Jákup Mikkelsen, sum starvast í Vinnuhúsinum**

KUMULERING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hans Jacob Mikkelsen, sum starvast í Vinnuhúsinum, sigur seg ikki hava lisið avtaluna í smálutum, men heldur, at hon verður eitt gott amboð hjá vinnuni, serliga fiski-og alivinnuni í Føroyum.

- Eg veit ikki í løtuni, hvørjar rávørur kunnu keypast og flytast á ES-marknaðin uttan toll og uttan loft. Tað vita teir best, sum sita ymsastaðni í vinnuni. Hinvegin er lítil ivi um, at avtalan kann koma at fáa stóran týdning fyri føroyska vinnu.

Hans Jákup hevur annars verið ráðgevi hjá alivinnuni, tá ið dumpingákærurnar vóru fyri á sinni, og tá ið kunngerðirnar um ILA og økishvíld vóru á skránni.

Hann heldur, at avtalan kann fáa stóran týdning fyri tey virkir – tað veri seg bæði laksavirki, rækjuvirki og fiskavirki, sum hava møguleika at keypa rávøru úr eitt nú Noregi og Íslandi og flyta góðskaðu vøruna á ES-marknaðin sum føroyska upprunavøru, nú tollforðingarnar eru burtur.

**Laksur og rækjur**

- Er laksurin við, soleiðis at føroysk portiónsvirkir kunnu keypa norskan laks, meirvirkað hann í Føroyum og selja hann aftur á ES-marknaðinum sum føroyskan laks, kann avtalan fáa stóran týdning.

Hans Jacob vísir á, at sama er galdandi fyri Rækjuvirkið á Oyri, sum í løtuni hevur eitt veikt rávørugrundarlag, nú bert eitt føroyskt rækjuskip fiskar rækjur.

- Hinvegin gevur avtalan eisini skipinum, sum eftir er, Havborg, møguleikar at selja sínar rækjur aðrastaðni, um prísurin er betur í eitt nú Noregi ella Íslandi, sigur hann og vísir á, at avtalan



Kumuleringsavtalan:

# Nógvir fótonglar eru lagdir fyri avtaluni

**Í seinastuni er tað serliga umsetingin til øll málini í ES, sum hevur tikið langa tíð, og á tíðindafundinum hósdagin nevndi Herluf Sigvaldsson, leiðari á uttanríkisdeildini, at skjølini í samband kumuleringsavtaluna man vera mest umsetta ”bók” úr føroyskum**

SØGULIGA GONGDIN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Søguliga gongin um kumuleringsavtaluna hevur annars verið henda:

Tað var í 1999, at Føroyar søktu um upptøku í tað táverandi Al-evropiska-upprunaøkið, sum var ein lutfalsliga nýggj skipan.

- Samráðingar við ES gingu tó ikki eftir vild, og úrslitið gjørdist, at Føroyar endaðu sum einasta evropeiska landið, ið ikki fekk limaskap í skipanini.

Í skrivi, sum vit fingu á tíðindafundinum hósmorgunin um kumuleringsavtaluna, verður sagt, at ES einamest óttaðist, at Føroyar skuldu gerast einar opnar dyr fyri vørum úr øðrum londum, serliga íslendskum og norskum fiskavørum.

Londini í skipanini vóru ES, EFTA og Mið-og Eystureuropeisku londini.

- Hesi seinast nevndu høvdu ikki øll søkt um limaskap í ES. Av teimum eru tað Bulgaria, Rumenia og Turkaland, sum higartil ikki hava fingið ES-limaskap.

Í skrivinum verður sagt, at tað kortini ikki altíð hevur verið ES, sum hevur ligið í buktini fyri føroyskum limaskapi í skipanini.

-Fótonglar hava verið lagdir frá mongum áhugabólkum. Ein ørgrynna av óformligum fundum hava verið millum Føroyar og ES um málið, og hetta hevur verið eitt av høvuðsmálunum á hvørjum felagsnevndarfundi við samveldið síðan 1999.

Lagt verður aftrat, at Sendistova Føroya í Brússel hevur í sínum dagliga samskifti við ES-myndugleikar og áhugabólkar verið ein kjarnuleikari í spurninginum, umframt at uttanríkisdeildin á løgmansskrivstovuni hevur n‡tt nógva orku til málið.

- Nógvar samráðingar gingu striltið, men í 2003 tóktist bresta fyri nev, sum tikið verður til.

Anfinn Kallsberg, táverandi løgmaður, var í Brússel um várið fyri at skunda undir málið, og nakrar mánaðir seinni søgdu ES-myndugleikar, at nú var klárt hjá Føroyum at koma upp í skipanina.

- Til stuttleikar kann nevnast, at ES á felagsnevndarfundinum í 2003 byrjaði fundin við at ynskja Føroyum vælkomnum upp í Al-evropiska upprunaøkið. Tíðindini bórust eisini í Føroyum um upptøkuna, men av ymiskum orsøkum gjørdist gildiskoman ongum í tí umfarinum vegna innanhýsis mannagongdir í ES.

Tað er serliga umsetingin til øll málini í ES, ið hevur tikið langa tíð.

Á tíðindafundinum hósdagin nevndi Herluf Sigvaldsson, at skjølini í samband kumuleringsavtaluna man vera mest umsetta ”bók” úr føroyskum.

Men Føroyar hildu at streingja á gildiskomuna.

Á vári 2005 var eisini Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, í Brússel, og eitt av málunum fyri vitjan løgmans var at skunda undir ES-myndugleikarnar í hesum sambandi.

- ES samtykti formliga á ráðsfundi, 11. oktober 2005, endaligu skjølini, og Føroyar eru nú partur av Pan-Euro-Med, sum felagsskapurin verður róptur á enskum. Síðan hevur Sendistova Føroya í Brússel vegna Føroyar undirritað frumskjølini við handilspartarnar, sum nú eru galdandi.

Lagt verður aftrat, at síðan Føroyar søktu um upptøku í Al-evropiska upprunaøkið í 1999, er skipanin víðkað munandi, soleiðis at hon eisini fevnir um miðjarðarhavslondini. Hetta er liður í ætlan ES, at Evropa og miðjarðarhavsøkið skulu samstarva á fleiri økjum.

- Samsavnanin av upprunaa er ein av mongu skipanum, sum ES ætlar at seta í verk fyri 2010 við miðjarðarhavslondini. Her er talan um sonevndu Pan-Euro-Med-ætlanina, sum varð sett í verk í 1995.

Við upptøkuni, hava Føroyar nú møguleika at skifta um uppruna á rávøru við 42